# Helena í hernað ímóti royking

*– Fyrstu høvuðsmálini eru at dagstovnar, heilsuverkið, skúlaverkið og Strandferðslan verða roykfrí øki, sigur Helena Dam á Neystabø*

ÁKI BERTHOLDSEN

Helena Dam á Neystabø ætlar sær nú rættiliga í hernað ímóti tubbaksroyking á almennum støðum.

Og hon sigur, at tað er neyðugt at fara til verka beinanvegin.

So avgjørd er landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum í einum aftursvari til Finn Helmsdal, løgtingsmann.

Finnur Helmsdal hevur spurt Helenu Dam á Neystabø, hví tað verður gjørt so lítið fyri at minka um roykingina her á landi.

Hon sigur, at hon er samd í, at vit gera ov lítið fyri at minka um roykingina í Føroyum.

Men tað ætlar hon sær at gera nakað við.

Hon sigur, at ætlanin er nú at seta eitt fyribyrgingarráð.

– Ætlanin hjá landsstýrismanninum er á henda hátt at fáa møguleika fyri at leggja størstu orkuna móti størstu vandunum.

Beinanvegin ráðið er skipað, ætlar Helena Dam á Neystabø at biðja tað um tilmæli um, hvørji tiltøk skulu setast í verk.

– Tó meti eg, at tað er neyðugt at fara til verka beinanvegin.

– Og tey fyrstu høvuðsmálini eru, at dagstovnar, heilsuverkið, skúlaverkið og Strandferðslan verða roykfrí øki, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon sigur, at fyri skjótt 10 árum síðani varð ein kunngerð sett í gildi um royking á almennum stovnum, men kunngerðin verður í stóran mun ikki fylgd.

Helena Dam á Neystabø sigur, at tí ætlar hon eisini at seta eina tubbakslóg í gildi, sum í størri mun fer at geva heimild til at minka um støðini, har roykt verður.

Hon veitir samstundis Løgtinginum trygd fyri, at tað fyribyrgjandi arbeiði ímóti tubbaksnýtslu verður raðfestast høgt.

– At tað hevur eydnast at gera flogleiðirnar millum Føroyar og umheimin roykfríar er prógv fyri, at tað ber til at fremja munagóð tiltøk, heldur hon.

Tí fegnast hon um, at Tubbaksráðið í ár hevur fingið 150.000 krónur at arbeiða við.

Seinastu nógvu árini hevur Tubbaksráðið annars fingið 50.000 krónur um árið, og Helena Dam á Neystabø heldur, at tað hevur gjørt eitt stórt arbeiði, hóast játtanin hevur verið lítil.

### Ikki einsamøll

Men Helena Dam á Neystabø ásannar eisini, at einsamøll megnar hon ikki at gera Føroyar roykfríar.

Tí heitir hon á allar landsstýrismenn um at gera sítt við m.a. at tryggja, at kunngerðin um royking verður hildin.

– Fyri at koma á mál við hesum vandamáli, er neyðugt, at ikki bara landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum raðfestir málið høgt.

– Tað er eisini neyðugt, at men at aðrir landsstýrismenn i gera tað, sigur Helena Dam á Neystabø.



*Higartil hava vit ikki gjørt nóg mikið fyri at fáa fólk at halda uppat at roykja. Men tað fer helena Dam á Neystabø at bøta uppá beinanvegin. Eitt nú fer hon at gera barnagarðar, skúlar, strandfaraskip, og onnur almenn støð, roykfrí*

# 33 brandpostar í ólagi

*Varaborgarstjórin í Klaksvík heldur tó ikki, at talan er um eina óforsvarliga støðu*

JÁKUP MØRK

Á býráðsfundi í Klaksvík fyrradagin, vórðu m.a. sløkkingarkranarnir í býnum á fundarskránni.

Tað hevur seinnu árini verið so, at fleiri av brandpostunum í býnum ikki hava verið í nóg góðum standi, og varð sløkkiliðsstøðin tískil biðin um at kannað, hvussu var statt við hesum.

Niðurstøðan hjá sløkkiliðnum var, at í minsta lagi 33 brandpostar vóru í ólagi, umframt at fleiri teirra vóru í ringum standi. Talan er sostatt um ein fjórðing av brandpostunum í býnum, sum ikki eru í lagi.

### Ikki óforsvarligt

Varaborgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, sigur við Sosialin, at tað at »brandpostarnir ikki rigga«, ikki skal skiljast soleiðis, at einki vatn kemur úr teimum, um brúk er fyri teimum.

Tað hevði jú verið ein fullkomuliga óforsvarlig støða, um eldur ikki kundi verið sløktur, orsakað av hesum. Talan er um, at hesir 33 brandpostarnir ikki lúka tey krøv, sum verða sett til slíkar, og hetta hevur býráðið eisini tikið til eftirtektar.



*Steinbjørn O. Jacobsen, varaborgarstjóri í Klaksvík*

Í ár verða so einar fimm til átta av hesum brandpostum skiftir úr, og eftir ætlan, verða hinir so skiftir komandi tvey árini, so vit í 2002 hava skift allar hesar brandpostar út.

Býráðið hevur tó ikki roknað við hesari útreiðslu í fíggjarætlanini, men útskiftingin verður mett at vera somikið átrokandi, at neyðugi pengurin, uml. 90.000 kr. nú verður fluttur frá kontoini fyri vatnveiting.

# Jógvan hevur úr at gera

*Heilsølan hjá Jógvan Weihe er í dag ein virkin fyritøka, men at byrja við var tað meira av neyð enn nøkrum øðrum, at farið varð undir hetta*

JÁKUP MØRK

Eftir at hann í meira enn 25 ár hevði verið í starvi hjá Landshandlinum og Kartna Winther, var Jógvan ein av teimum mongu, sum merktu syrgiligu avleiðingarnar, tá búskaparkreppan rakti oyggjar okkara.

Felagið, sum hann starvaðist hjá, fór av knóranum, og brádliga stóð Jógvan í Teirri støðu, at einki arbeiði var til sín.

Hetta fekk hann tó ikki at fella í fátt, men tvørturímóti eggjaði tað honum til at fara undir egið virki, og hetta hevur hann havt síðani.

### Einki annað at gera

Sum hann sjálvur sigur, so var einki annað at gera. Sambandi við ymsu søluliðini var jú í lagi frammanundan, so hví skuldi hann ikki roynt hetta, eins væl og nakað annað?

í 1993 leigaði hann seg so inn í ein kjallara við Marknagilsvegin, men skjótt gjørdist karmarnir ov treingir, og tískil flutti hann niðan aftur á Staravegin, har bygningurin hjá Louis Poulsen nú stóð tómur, eftir at Kartni Winther fyrr hevði hildið til á staðnum.




*Jógvan hevur úr at gera í hesum døgum. Her er hann á truckinum og baksast við ein platt av fóðuri*

**Mynd: Jens Kr. Vang**

Tað er serliga ymisk útgerð til náttúrufarandi umframt fóður av ymsum slag, sum Jógvan hevur lagt seg eftir at selja. Har er fiskireiðskapur, arbeiðsklæði, patrónir, hoyggj, seteplið, kunsttøð og annað, og greiður Jógvan frá, at hann við hesum hevur roynt at avmarkað seg til ein ávísan málbólk, so hann ikki kemur at fevna um meira enn hann er førur fyri at røkja.

Treyðugt so, onkrar keypmansvørur hevur hann sjálvandi, men hetta er ikki størsti parturin av virkseminum.

Sjálvur heldur hann mest um fóðrið, sum verður blandað eftir serligum forskriftum, alt eftir um talan er um seyða-, neyta- ella hestafóður. Jógvan leggur dent á, at talan er um sonevndar opnar blandingar, har innleggsseðil eisini er hjálagdur, so síggjast kann, hvat er latið í fóðurið.

### Fimm fólk

Tá hann byrjaði við Marknagilsvegin, var Jógvan einsamallur um virkið, men so við og við hevur verið neyðugt at sett meira fólk afturat. Í dag hevur Jógvan fýra onnur fólk í starvi, so hann og konan, Hildubjørg, sum tekur sær av pappírsarbeiðinum, hava úr at gera í dag, hóast tað fyri nøkrum árum síðani sá heldur svart út.



# »Her vil eg hava regn«

*Annika Hoydal arbeiddi í 2 ár við fløguni, sum hon hevur givið út fyri at heiðra William Heinesen. Á fløguni eru yrkingar eftir William Heinesen, sum Annika kendi sum barn. Sunnudagin syngur Annika sangir av fløguni í Norðurlandahúsinum*

DAGFINN OLSEN

Nógv tiltøk vóru á skránni, tá 100 ára føðingardagur William Heinesens var 15. januar.

Sunnudagin klokkan 16 er enn eitt tiltak á skránni, sum hevur samband við William. Tá fer Annika Hoydal á pall at syngja løg, sum hon hevur sett til yrkingar hjá William og sum hon júst hevur givið út á fløgu.

### Arbeitt í 2 ár

Annika hevur arbeitt eini 2 ár við fløguætlanini. Hon hevur valt yrkingar, so tær umboða breitt úrval av yrkingum Williams.

Hon hevur eina rúgvu av pappírum, ið siga nei til umsóknir um fíggjarligan stuðul. Men tá alt kemur til alt, so hava øll fingið sítt. Teir 13 tónleikararnir á fløguni hava fingið eftir ásettu gjaldstreytum. Tað verður neyvan nakað eftir til Anniku, men tað leggur hon minni í.

Tá alt er lagt saman, so ljóðar rokningin fyri fløguna uppá einar 240.000 krónur, ið allar eru goldnar.

### Her vil eg hava regn

Til at leggja tónleikin á fløguni tilrættis, hevur Annika fingið John von Daler.

Hann er úr USA, men kom til Danmarkar, tá hann rýmdi undan Vietnamkrígnum.

Stuttligt er, at tá Annika og hini í Harkaliðnum luttóku í Grand Prix í 1979, tá sat John von Daler í orkestrinum.

Hann hevur annars spælt við t.d. Fuzzy og Poul Dissing. Eisini hevur hann sína egnu kvartet, ið eisini spælir á fløguni.

John von Daler hevur lisið litteratur og hetta metir Annika hevur verið stórur fyrimunur, tá tey hava arbeitt, tí so hevur hann eisini havt ymisk hugskot og tey hava prátað um yrkingarnar.

Sjálv dugir Annika ikki nótar og hon leikar heldur ikki nakað ljóðføri. Hon syngur løgini.

Tá John von Daler so hevur fest tey á blað, so hevur hann eisini havt hugskot. Hetta hevur Annika dámað væl, tí hon heldur annars, at tónleikarar ofta bert hugsa í tónum.

Annika greiðir sjálv frá sínum ætlanum við løgunum í myndum.

– Eg kann t.d. siga, at her vil eg hava regn, sigur Annika.

Tó heldur Annika, at útlendskir tónleikarar hava ilt við at fylgja við til tíðir. Teir spyrja ofta, um steðgirnir ikki kunnu vera styttri ella longri.

- Men nú eri eg so gomul, at eg tori at siga nei, sigur Annika.

Á fløguni hevur hon flættað nøkur kvæðaløg saman, og har hevur Sunleif Rasmussen verið til hjálpar og hevur fest á blað fyrst, tí hjá honum, sum føroyingi, falla steðgirnir og rútman náttúrliga.

### Teir dugdu

Í barnaárunum kendi Annika Hoydal væl William Heinesen. Pápi Anniku, skaldið Karsten Hoydal, og William vóru vinmenn og sótu ofta og prátaðu um alt møguligt.
Um kjarnorkubumbuna og um nú kríggj mundi koma aftur.

Hetta hava báðir eisini viðgjørt í skaldskapi sínum.

Annika heldur, at tað er stak áhugavert og hugvekjandi, so væl sum listafólkini tá arbeiddu saman.

- Teir samstarvaðu væl, teir menninir. T.d. høvdu grannarnir William og Heðin Brú kúgv saman og ætlaðu eisini at skriva bók saman. Hjá teimum kallaðist einki, at stjala frá hvør øðrum. Eg haldi Wiliam hevði tað góða sum trúgv ella grundreglu, sigur Annika.

Annika hevur gjørt sær ómak, tá hon hevur valt út millum yrkingarnar hjá Williami.

– Tá ein hevur kent mannin, so fer ein eisini at hugsa um, hvar ein hevur sínar hugsanir frá. Tað er klárt, at ein velur eisini útfrá sær sjálvum. Eftir tí, sum klingar í einum sjálvum, sigur Annika, sum metir, at yrkingarnar hjá Willami eru ikki bundnar í tíð.

Tær eru ikki nútímans ella farnar av móta. Stjørnurnar og himmalhválvið fara ikki av móta. Eisini tónleikurin sampakkar við hesa hugsan.



*Eg haldi Wiliam hevði tað góða sum trúgv ella grundreglu, sigur Annika Hoydal, sum sunnudagin fer á pall við løgum, sum hon hevur sett til yrkingar hjá William Heinesen.*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

### Føroyingar á pall

Tað vera føroyskir tónleikarar, sum fara á pallin í Norðurlandahúsinum saman við Anniku sunnudagin.

Danskir tónleikarar eru bókaðir langt fram í tíðina. Tí hevur John von Daler skrivað tónleikin fyri 3 ljóðføri.

Á konsertini sunnudagin fer Edvard Nyholm Debess at leika kontrabass og elbass. Rógvi á Rógvu leikar trummur og Magnus Johannesen situr við tangentarnar.

Alt sera dugnaligir menn, sum Annika trygt kann líta á. Hon hevur eisini spælt saman við teimum hvør sær áður, men nú fara tey so øll á pall saman. Í hesum døgum venja tey dúgliga, tí væl skal tað ljóma og tónleikurin er ikki sørt krevjandi.

Annika vitjar í Føroyum til 2. februar. Tá fer hon aftur til Danmarkar, har uppgávur bíða eftir føroysku sjónleikarakvinnuni.

# Fróðskaparsetrið 2000

*Faldari er gjørdur, ið vísir á útbúgvingar, sum Fróðskaparsetrið bjóðar í ár*

DAGFINN OLSEN

Fróðskaparsetur Føroya vísir í snøggum faldara á tær útbúgvingar, sum standa í boði í ár.




Føroyamálsdeildin bjóðar í september exam. art. og cand. phil. í føroyskum. Freistin at søkja er 30. juni 2000.
Náttúruvísundadeildin hevur á skránni støðisútbúgving í støðd-/alisfrøði. BS í kolvetnisverkfrøði og BS í ravmagnsverkfrøði. Freistin at søkja er 30. juni 2000.

Søgu- og samfelagsdeildin. Várið 2000 er møguleiki at lesa cand. phil. í søgu- og siðsøgu. Framhaldslestur eftir BA í søgu- og siðsøgu. Freistin at søkja er í januar 2000.

Í september byrja ársnám í samfelagsfrøði og ársnám í búskapi, handli og máli og søkjast skal áðrenn 30. juni 2000.

Felags upptøkukrøv eru miðnámsútbúgving ella líknandi


**GÓÐIR BRÚKTIR BILAR**

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera** 2.0d GX, gráur, 4 hurðar, árg.1997,106.000 km. | 126.000 |
| **Nissan Bluebird** 2.0 SGL, vínreyður, 4 hurðar, árg. 1985, 182.000 km. | 22.000 |
| **Nissan Patrol** 3.3 Turbo S/R, reyður, 5 hurð., árg. 1988, 185.000 km. | 48.000 |
| **Peugeot** 406 ST 1.9 DT, beige, 4 hurð., árg. 1996 | 132.000 |
| **Peugeot** 406 ST 2.1 DT, vínreyður, 4 h., árg. 1997, 108.000 km. | 167.000 |
| **Citröen Xantia** TD, vínreyður, 5 hurðar, árg. 1995, 161.000 km. | 120.000 |
| **Ford Escort** 1.3, bláur, 3 hurðar, árg. 1987, 145.000 km. | 16.000 |
| **Ford Fiesta** reyður, 3 hurðar, árg. 1991, 120.000 km. | 39.000 |
| **Opel Kadett** 1.3S LS, bláur, 5 hurðar, árg. 1987, 95.000 km. | 24.000 |
| **Toyota Corolla** gráur, 4 hurðar, árg. 1987, 302.000 km. | 22.000 |
| **Toyota Corolla** st. car, bláur, 5 hurðar, árg. 1989, 207.000 km. | 35.000 |
| **Toyota bussur** Hi Ace DSL, hvítur, 4 hurðar, árg. 1988, 201.000 km. | 34.000 |

Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/f Meinhardt Arge
Tjaldursvegur • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61


# Henrik Nordbrandt fekk virðislønina

*Danin Henrik Nordbrandt fekk í gjár Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins*

DAGFINN OLSEN

Klokkan 10:30 í gjár kunngjørdi dómsnevndin undir Norðurlandaráðnum, at 54 ára gamli yrkjarin Henrik Nordbrandt fær Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri yrkingasavnið „Drømmebroer“ frá 1998.

Hetta er 39. ferðin, at virðislønin áljóðandi 350.000 krónur verður latin. Fyri 9. ferð fær ein dani heiðurin. Í fjør fekk Pia Tafdrup virðislønina.

Henrik Nordbrandt fær virðislønina handaða í samband við ráðstevnu hjá Norðurlandaráðnum í Keypmannahavn tann 6. mars.

Henrik Nordbrandt hevur í mong ár búleikast í Spania og Turkalandi og er í løtuni í Malaga. Hann hevur fingið mangar virðislønir fyri skrivligu avrik síni, sum m.a. eru fleiri enn 20 yrkingasøvn, esseys, tvær barnabøkur, og ein kókibók.

Bókin hjá Oddvør Johansen, „Í morgin er aftur ein dagur“ var innstillað til heiðurslønina, men kom ikki upp í part, tí týðarin gjørdist ikki liðugur til ásettu tíð. Bókin verður ístaðin við aftur næsta ár.